# Basarur í KFUK

**Hósdagin skipar KFUK í Havn fyri tí árliga basarinum. Peningurin, ið kemur inn, fer til ungdómsvirksemið hjá felagnum.**

BASARUR
*Annika S. Biskopstø, starvsnæmingur*

Ì samfull 80 ár hevur verið skipað fyri tí sonevnda KFUK-basarinum. Sagt verður at onki ár er gloppið burtur ímillum, og tað merkir, at árið í ár skal hátíðarhaldast.

Hesaferð verður nógv gjørt burturúr, eitt nú við fjøltáttaðum og áhugaverdum loppumarknaði. Har ymisk gomul ting kunnu keypast s.s silvurlutir, postalín, glas, gamalt hondarbeiði og onnur brúksting. Eisini kanst tú keypa húgvur, taskur og skógvar í gomlum sniði. Lutirnir hevur felagið fingið frá eldri limum.

Um tú hevur hug, kanst tú keypa tær ein góðan kaffimunn og okkurt leskiligt afturvið. Fyri børnini skipa KFUK fyri einum stórum fiskibrunni. Eisini verður køkutombula og eydnuhjól.

KFUK hevur hetta árið gingið hús til hús og selt lutaseðlar. Kvøldið endar við at vinnarnir av lutaseðlunum verða trektir.

Ætlanin er at halda áfram við hesum tiltakið. So komandi ár um hesa tíðina hoyra vit aftur um tann árliga basarin. Basarurin verður í hølunum hjá KFUK í Havn hóskvøldið 6. november kl. 19.30.



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri, í løtum upp í hvassan vind. At byrja við skýggjað og turt, seinni regn. Hitin millum 7 og 11 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og suðri, út á dagin upp í hvassan vind av suðri. At byrja við regn, men annars skýggjað og támut veður. Hitin millum 7 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri. Fyri tað mesta turt, men skýggjað og támut í skiftum. Hitin millum 8 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri. Fyri tað mesta turt, men skýggjað og támut í skiftum. Hitin millum 7 og 12 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | 3 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 14 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 12 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 11 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 1 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 18 |
| Malta | 20 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | – |
| New York | 26 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 23 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst í ein útsynning úr Føroyum gongur í ein landnyrðing og dýpist. Brúgvaløg haðani við regni koma inn yvir Føroyar. Eitt lágtrýst yvir Asorunum gongur móti Bretsku oyggjunum og brúgvaløg haðani við regni koma eisini inn yvir Føroyar.



Fríggjadagin fer enn eitt djúpt lágtrýst vestur um Ísland, meðan eitt hátrýst yvir Mið-Europa spakuliga breiðir seg í ein landnyrðing og norðan og leggur seg yvir Skandinaviu í vikuskiftinum. Hetta hevur lýggja luft við sær sunnaneftir inn yvir Føroyar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/11 kl. 06[00]– 04/11 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,7°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 03/11 kl. 06[00]–04/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 7,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. november: Fyrra kvarter
9. november: Fullmáni
10. november: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. nov | 03.55 | 16.14 | 02.55 | 15.14 | 03.10 | 15.29 | 05.55 | 18.14 | 06.55 | 19.14 | 02.10 | 14.29 | 01.10 | 13.29 | 04.10 | 16.29 | 05.10 | 17.29 | 03.40 | 15.59 | 04.55 | 17.14 |
| 6. nov | 04.34 | 16.53 | 03.34 | 15.53 | 03.49 | 16.08 | 06.34 | 18.53 | 07.34 | 19.53 | 02.49 | 15.08 | 01.49 | 14.08 | 04.49 | 17.08 | 05.49 | 18.08 | 04.19 | 16.38 | 05.34 | 17.53 |
| 7. nov | 05.12 | 17.31 | 04.12 | 16.31 | 04.27 | 16.46 | 07.12 | 19.31 | 08.12 | 20.31 | 03.27 | 15.46 | 02.27 | 14.46 | 05.27 | 17.46 | 06.27 | 18.46 | 04.57 | 17.16 | 06.12 | 18.31 |
| 8. nov | 05.51 | 18.11 | 04.51 | 17.11 | 05.06 | 17.26 | 07.51 | 20.11 | 08.51 | 21.11 | 04.06 | 16.26 | 03.06 | 15.26 | 06.06 | 18.26 | 07.06 | 19.26 | 05.36 | 17.56 | 06.51 | 19.11 |

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI

5 707265 100036 >